



# Liturin ger ongan mun

KRISTIAN ZACHARIASSEN, BIOLOGASSISTENTUR

**HAVTASKUGØRN: Tað ger eftir øllum at døma ongan mun, hvønn lit reiðskapurin hevur, tá ið tú fiskar havtasku við gørnum.**

Havtaskugørn eru vanliga grøn - og eingin grund er til at broyta tað. Tí liturin ger eftir øllum at døma hvørki til ella frá. Fiskirannsóknarstovan hevur í 2005 og 2006 roynt havtaskugørn í sjey litum og niðurstøðan er rættiliga greið: Liturin hevur ongan týdning fyri fiskiskapin.

Í 2005 vórðu fimm litir sammettir - reytt, blátt, grønt, hvítt og gult. Í 2006 vórðu eisini fimm litir sammettir, men tá vóru litirnir hvítt og gult skiftir út við svart og grátt.

Gamaní fiskaðu tey bláu best í 2005, og tað bleiv eisini til eina yvirskrift í ársfrágreiðing hjá Fiskirannsóknarstovuni fyri hetta árið. Men í 2006 var vent í holuni, tí tá fiskaðu tey bláu næst minst, og eftir at hava gjørt royndir í tvey ár er niðurstøðan, at liturin á havtaskugørnunum hevur helst ongan týdning fyri fiskiskapin.

Tað er garnabáturin Gudrun, KG 243, úr Klaksvík, sum hevur gjørt royndirnar saman við Fiskirannsóknarstovuni. Tey ymisk littu gørnini vóru sett saman í ein trossa, og veiðan í hvørjum liti varð skrásett, hvørja ferð drigið varð.






*Reytt, blátt, grønt, hvítt, gult, svart ella grátt? Fyri havtaskuna er tað eftir øllum at døma líka vítt sum sítt, hvønn lit gørnini hava.*